# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Niels Hansen, Klaksvík**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hvítusunnuaftan, 38 ára gamal Farið verður úr kapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Niels, kunnu lata eina gávu á konto í peningastovnunum.

**Jógvan Jákup Gardar**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Nordborg í Danmark, andaðist Hvítusunnudag í Norðborg, 67 ára gamal.

## Bilar í morgin

**Vegna plásstrot í blaðnum í dag eru bilasíðurnar, sum vanliga eru í blaðnum mikudag, fluttar til í morgin hósdagin 4. juni.**

*-red*

**Dagurin**
**3. juni. Erasmus**, deyður umleið ár 300. Biskupur í Antiokia. Fleiri ferðir varð lagt eftir honum, og hann varð illa píndur, men komst undan og doyði í friði og náðum. Navnið kemur av grikskum orði, ið merkir elskar.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Fyrsta vistfrøðiliga frisørsalong í Havn

*Susanna Køtlum saman við nøkrum av sínum starvsfólkum f.v.: Jona Joensen, Marin Johannesen og Súsanna Jøkladal*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




Móttøka var á Salong Madonnu í Tróndargøtu í Havn týsdagin 2. juni, í sambandi við at Súsanna Køtlum nú eigur og rekur salongina. Súsanna hevur starvast á salongini síðan januar 2008.

Súsanna sigur, at hon vil reka salongina vistfrøðiliga, og brúkar einans vørur sum eru góðkendar av Københavns Miljønetværk. Súsanna hevur búð í Føroyum í skjótt tvey ár. Hon flutti heim úr Keypmannahavn, har hon var góðkend sum vistfrøðiligur frisør.

Hon er útlærd á Frederiksberg, har hon arbeiddi í 10 ár, og eitt ár sum freelance frisør. Hon hevur havt nógvar spennandi uppgávur í síni tíð sum frisør, og gjørt hár hjá nógvum kendum fólkum, m.a. vóru FCK leikarарnir fastir kundar á salongini, har hon arbeiddi, umframt Mads Larsen, Gordon Kennedy, Cheef One og fleiri onnur.

Súsanna hevur eisini útbúgving sum linergist, tað vil siga permanent make-up frá Long Time Liner, sum eisini er møguligt at fáa gjørt á salongini. Hon hevur starvast hjá einum kosmetologi eina tíð, so ymiskar viðgerðir verða at bjóða í hesum sambandi. Ætlanin er at víðka økologisku tilboðini á salongini. Salong Madonna er fyrsta vistfrøðiga frisørsalong í Havn

Hjá Salong Madonnu starvast í dag umframt Súsonnu Køtlum, Mena Joensen, Súsanna Jøkladal, Kristianna Joensen, Annika Vidtfeldt, Jona Joensen, Marin Johannesen og Gunrið Christiansen.

*-red*

# Valarar hittast aftur

20. juni 2009 verður stórt valaratiltak á Seglloftinum á Tvøroyri. Sama nevnd, sum fyri nøkrum árum síðan tók stig til væleydnaða valaratiltakið, skipar fyri. Nevndin sigur seg ikki verða bagna fyri at endurtaka eina succés, men roknar við at komandi tiltakið fer at verða enn betri, nú Seglloftið verður karmur um tiltakið.

Tiltakið er fyri øll, sum búgva, eru uppvaksin í Valinum ella hava tilknýti til Valin.

Seinnapartin leygardagin 20. juni verður almennur valarafundur í Valarabrekkuni við røðum, sangi, undirhaldi og Tvøroyarar Hornorkestur spælir.

Eftir valarafundin verður “marcherað” við hornorkestrinum á odda oman til Thomsen, har forvitnisligar gamlar myndir og filmar úr Valinum verða vístir, og høvi verður at hitta gamlar vinir og kenningar á pubbini og á uttandura kaféini har eitt tónleikalið við valarum fer at spæla.

Um kvøldið verður Valaraball á Seglloftinum við spennandi matarskrá, undirhaldi og dansi.

Tiltakið kostar 350 kr. fyri hvønn og skal gjaldast á konto: 9181 -1715064 í Eik í seinasta lagi mánadagin 8. juni. Kvittanin er atgongumerki.

*- red*



*Gomul mynd úr Valinum í 1889. Fremst á myndini eru tvær samanbygdar lonir, ið vera nevndar Roykstovan. Tað eru fyrstu húsini, sum eru bygd á Tvøroyri eftir at kongiligi einahandilin kom á Tvøroyri í 1836. Faktorurin sum rak handilin búði við sínum húski í hesum húsum. Tey fluttu inn tann 27.oktobur 1836.*
*Um kirkjuna á mynduni er at siga, at hon var bygd úti á bø í Froðba í 1840, og longu í 1856 varð hon niðurtikin og flutt inn í »Kirkval« at standa. Í 1908, tá tvørafólk fáa tað núverandi kirkjuna, ið Mortensenmenninir góvu sóknini, verður gamla kirkjan aftur niðurtikin og flutt til Sandvíkar, har hon enn stendur*